# Føroyingafelagið í Aalborg

*Ábyrgdari av hesum skjali er arbeiðsbólkurin, ið er ásettur av sitandi nevnd hjá felagnum.*

## Sitandi nevnd hjá felagnum

*Bryndis í Dali*

*Borgar Jónsson Stórá*

*Jarmundur Steinkross*

*Árni Eyðunsson Lisberg*

*Martin Didriksen*

*Brynhild Dam*

*Kára Veirum*

## Arbeiðsbólkurin

*Magnus Pauli West*

*Ingi Midjord*

*Meinar Ortind*

*Bryndis í Dali*

*Martin Didriksen*

*Brynhild Dam*

ÁLABORG

## Frágreiðing um felagið við atliti til stuðul á fíggjarlógini 2019

Henda frágreiðingin er gjørd í samband við at játta føroyingafelagnum í Aalborg **kr. 200.000,00** á fíggjarlógini fyri 2019 og frameftir undir §7.24.1.04.

## Føroyingafelagið í Aalborg

Føroyingafelagið í Aalborg, eisini nevnt Álaborg, virkar sum miðdepil fyri føroyskar útisetar; íroknað lesandi, vitjandi og fastbúgvandi í Aalborg og í Norðurjútlandi. Álaborg hevur átikið sær ábyrgdina at skipa fyri tiltøkum, hvørs endamál er at knýta bond millum útisetar eins og at stimbra sambandið við Føroyar, føroyska samleikan og føroysku mentanina, meðan tey eru í Danmark.

Álaborg hevur eina sjeymannaða starvsnevnd, har ið øll arbeiða sjálvboðið. Nevndin stendur fyri meginpartinum av sjálvbodna arbeiðinum, meðan sjálvboðin hjálparfólk geva eina hjálpandi hond til størri tiltøk.

## Virksemi

Álaborg er eitt sera virki felag við afturvendandi viku- og mánaðarligum tiltøkum og samstundis eisini einstøkum tiltøkum. Tá 2018 er av hevur felagið skipað fyri 148 tiltøkum. Hettar er ein tvífaldan bara frá 2017, tá felagið skipaði fyri umleið 70 tiltøkum.

*Niðanfyri eru nøkur dømir av tiltøkum:*

- Álastevnan
- Karnivalsgonga
- Álabrunsj
- Gudstænastur
- Ræstkjøtaveitslan
- Jólaveitslan
- Grillveitslur
- Jólahald
- Sunnudagsskúli
- Spurnakappingar
- Innandura fótbóltur
- Innandura flogbóltur
- Badminton
- Kom & Spæl
- Ladies Night
- E-Sport kappingar
- Tórskvøld
- 12-Maður uttanlands
- Skattaveiða fyri børn
- Tónleikaframførslur
- Føroyskir stuttfilmar
- Føroyskur sjónleikur
- Føstulávint
- Politiskar framløgur
- Barnabio

## Limatalið

Seinastu árini hevur felagið upplivað stóra tilgongd av limum. Stóra tilgongdin stendst m.a. av, stóra virkseminum hjá felagnum, og at fleiri Føroyingar velja at flyta til Aalborg framum aðrar danskar býir.

Frá 2015 er limatalið í Álaborg fari úr 105 og upp í 270 í 2018 (dagført 29. oktober 2018).

*Niðanfyri sæst limatalið hjá Álaborg sammet við føroyingafeløgini í Århus og Odense/Fyn.*




*Limatøl dagførd: Aalborg 29/10/18 - Århus 14/05/18 - Odense/Fyn 28/09/18*

## Tilflyting til Aalborg

Aalborg er einasti lestrarbýur í Danmark, ið hevur upplivað vøkstur í tilflyting av føroyingum. Allir aðrir lestrarbýir hava eina afturgongd. Hagtøl vísa, at talið av føroyingum í Aalborg er voksið við 49%, frá 2014 til 2017. Í hesum hagtali framgongur ikki, hvussu nógvir føroyingar nema sær yrkisútbúgving í Aalborg. Sostatt má metast, at vøksturin er enn hægri enn tey 49%. Viðmerkjast kann, at síðani 2012 hevur Aalborg havt næst hægstu tilflyting av føroyingum - einans yvirhálað av Keypmannahavn.

Í samband við viðgerðina av tilflyting er vert at viðmerkja, at føroyingar, ið flyta til Aalborg, eru raskast at flyta aftur til Føroyar. Hagtøl vísa, at 13% av Føroyingum í Aalborg flyta beinleiðis aftur til Føroyar. Aðrastaðni í Danmark er talið 7%.




*Danmarks Statistik [2018] – Tilflyting frá Føroyum til danskar býir.*

## Inntøkugrundarlag hjá Álaborg

Álaborg móttekur fíggjarligan stuðul frá Aalborg kommunu og Betri samtakinum. Í 2018 er stuðulin frá Aalborg Kommune kr. 8.487,00, og hesin stuðul er tengdur at limatalinum fyri 2017. Stuðulin frá Betri samtakinum er kr. 5.000,00 fyri reklamu á heimasíðuni www.alaborg.fo. Sostatt er støðan tann, at felagið má brúka pening fyri at tjena pening. Hesin háttur er sera óstøðugur, tí um ein íløga ikki gevur væntaða úrslitið, so rakar tað felagið sera meint. Hesin háttur kann metast við at taka tvey fet fram og eitt, kanska hálvtannað, fet aftur.

Fíggjarliga støðan í felagnum er ein meinbogi, ið ger tað trupult at menna felagið og gera væntaðar íløgur.

## Hølisviðurskifti

Álaborg húsast í einum bygningi, ið Aalborg kommuna varðar av. Bygningurin er frá 1942 og krevur ábøtur og viðlíkahald fyri áleið 3 milliónir krónur. Hesa íløgu er kommunan ikki sinnað at gera, tí kommunan veit ikki rættuliga, hvat endamálið við bygninginum skal vera framyvir. Omaná hetta liggur bygningurin í einum "villa øki", har barnafamiljur og eldri búleikast.

Ein onnur avbjóðing við hølunum er, at tey einans eru góðkend til 55 fólk, meðan 270 limir eru í felagnum. Støddin á hølunum hevur ofta við sær, at langt frá allir limir, ið hava hug, sleppa til tey ymsu tiltøkini. Hetta hevur so aftur við sær, at felagið missur inntøkur og sambandið við limirnar.

Fyri at gera ilt verri, hevur økta virksemið í felagnum havt við sær, at kommunan byrjar at steðga felagnum í at menna seg meira. Orsøkin er at virksemið til tíðir er til ampa fyri grannarnar. Sostatt hevur kommunan lagt upp til, at um felagið ynskir at gerast meira virki, má felagið finna sær onnur hølir.

Felagið hevur sent kommununi fyrispurningur um nýggj høli og hevur fingið at vita, at leigan til hølir, ið nøkta tørvin hjá felagnum, er meir enn tíggjufalda so høg sum verandi hølir - yvir kr. 100.000,00 árliga. Vísandi til roknskapin hjá felagnum fyri 2017, er høga leigan til eini nýggj høli ógjørlig hjá felagnum at bera einsamalt.

*Niðanfyri eru tvey dømir, har hølisviðurskiftini ikki vóru/eru nøktandi.*

Til avhildin tiltøk, so sum spurnakappingar, ræst- og jólaveitslur hevur felagið verið noytt til at læsa hurðina, tí hámarkið fyri luttakandi hevur verið nátt.

Felagið fer at skipa fyri tiltakinum Tórskvøld komandi ár. Í samband við fyrireikingarnar, hevur Tórshavnar kommunaført fram, at hølini eru ov lítil til tiltakið og hevur lagt fram at felagið leigar onnur hølir til tiltakið.

## MFS í Aalborg

Tann 29. oktober 2018 hevði MFS stovnandi aðalfund í hølum felagsins. MFS metir Aalborg sum ein sera spennandi og viðkomandi bý fyri felagsskapin og hevur tí avgjørt at stovna eina deild í Aalborg. Ætlanin er, at MFS og Álaborg skula samstarva við hvørt annað, og at MFS lænir hølið hjá Álaborg ókeypis, tá tey skipa fyri tiltøkum.

At MFS sær Aalborg framum aðrar danskar lestrarbýir (Odense og Århus) vísur, at uppáhaldið hjá Álaborg at felagið og býurin gerst alsamt meira viðkomandi fyri føroyska útisetan og Føroyar.

## Framtíðarætlanir

Álaborg er dagliga í harðari kapping við tey nógvu tilboðini, ið Aalborg býur bjóðar, og útlitini eru, at enn fleiri tilboð verða atkomulig hjá føroyinginum í Aalborg. Sostatt er lætt hjá útisetum at taka av nógvu tilboðnum, ið ikki finnast í Føroyum og harvið venda Føroyum, føroysku mentanini og føroyska felagsskapinum baki. Skal lív vera í føroyska umhvørvinum í Aalborg, má felagið framhaldandi menna virksemi sítt við spennandi og áhugaverdum tiltøkum í hølum, sum eru innbjóðandi og hóskandi fyri øll. Til hesar ætlanir krevst fígging, og trupult er at náa hesum við verandi fíggingarleisti. Tí, sum áður nevnt, arbeiðir nevndin hvønn dag í einari fíggjarligari mótbrekku - ein leistur, sum er slítandi á tey, ið varða av felagnum og teimum sjálvbodnum. Omaná tað er tað trupult at gera íløgur í nýggj høli og tiltøk, tí hvør avgerð er eitt sats - eitt sats, ið lættliga kann hava vanlukkuligar fíggjarligar avleiðingar fyri felagið.

Sostatt metir nevndin, at stuðul má til, um felagið skal verða ein virkin viðspælari hjá føroyska útisetanum í Aalborg. Ein viðspælari, sum hjálpir føroyingum at fella væl inn og ikki villast í hesum fjølmentaða stórbýi í Danmark. Ein stórbýur, ið hevur nærum óendaligar møguleikar og tilboð, sum ikki finnast í Føroyum.

Tað er ein sannroynd, at fellur ein føroyingur væl inn í tað danska samfelagið og í tilgongdini missur sambandi við Føroyar og føroysku mentanini, gerst tað alsamt truplari hjá hesum at flyta heim aftur eftir loknan lestur.